## Viborg vann á Lyngby

Súni Olsen hjá Viborg, og Christian Lamhauge Holst og Tem Hansen hjá Lyngby byrjaðu allir inni í botnbrakinum millum Viborg og Lyngby, sum var leiktur í Viborg í dag. Súni Olsen var skiftur út eftir 65 minuttir spæl. Christian Holst var ógvuliga eyðsýndur í 1. hálvleiki, og tað var eftir eitt skot frá honum, at Lyngby skoraði til 1-0. Málið til 2-0 var rættiliga føroyskt. Tem Hansen taklaði bóltin frá einum Viborg-spælara, og beindi hann yvir til Christian Holst, sum skoraði til 2-0. Men so vendi dysturin fullkomiliga, og Viborg tryggjaði sær ein 3-2 sigur.



## Dómararnir avgera

Venjarin hjá danska felagnum FC Midtjyllandi, Erik Rasmussen, heldur, at dómararnir hava avgerandi ávirkan á, hvør vinnur heiðursmerki í superliguni. Hetta sigur hann, eftir at ein av hansara lyklaspælarum varð útvístur í gjár. - Úrslitið kann ikki broytast, men útvísingin var avgerandi, og tað er keðiligt, at dómararnir skulu gera av, hvar heiðursmerkini enda, segði Erik Rasmussen við Ekstrablaðið.

EB/Streymur-B71 2-1 (1-1):

# Næsta finalan á rað



*Símin Hansen var í longum løtum størsta hóttanin hjá B71. Eftir steðgin vórðu arbeiðsumstøðurnar tó sera truplar, tá báðir partar høvdu ilt við at fáa spælið at hanga saman*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**Tað var stólpin og út hjá B71, sum í evstu løtu mátti veitra farvæl til finalumøguleikan í steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast EB/Streymur varð mett sum hampuliga greiður favorittur undan seinnu hálvfinaluni móti B71, so løgdu sandoyingar ikki tað stóra í hetta.

Frá fyrsta bríksli royndu gestirnir at fáa gongd á sítt spæl, og fyri tað nógva gekk hetta eisini eftir vild fyrstu løtuna. Heimaliðið tóktist í ov stóran mun tilvitað um, at »bara« teir hildu málið reint, vóru teir í finaluni, og tí var avmarkað, hvussu nógv teir tordu at trýsta.

### Ynskið gjørdist marran

Í eini óimponeraðari 4-4-2 uppstilling royndu sandoyingar tíðum at spæla seg fram yvir kantarnar, og meira enn tí einu ferðina eydnaðist eisini at koma fram til støður, sum álvarsligur vandi kundi staðist av.

Og eftir 20 minuttum komu sandoyingarnir í ynskistøðuna. Í fyrstu atløgu blokkaði Marni Djurhuus skotroynd í evstu løtu, men tá hornasparkið varð sent innfyri, beyð ikki bøtur. Fabio Vieira var hægstur á bóltinum, og so stóð 0-1.

Men heldur enn at spæla, sum var talan nú um ynskistøðu, fullu gestirnir mest sum púrasta í fátt. 70 minuttir er dekan ov long tíð til at verja tepra leiðslu á útivølli, men restina av hálvleikinum lótu gestirnir alt initiativ frá sær.

Og so settist EB/Streymur av álvara á dystin. Teir javnaðu, tá Arnbjørn T. Hansen sera hegnisliga stútaði frísparksbólt frá Marna Djurhuus í kassan, og tað vildi ikki verið nakað sum helst forgjørt, um talan varð um trivaliga heimaleiðslu undan steðginum. Serliga var Hanus Eliasen nær við tvær ferðir, men báðu ferðirnar stóð Símun Røgvi Hansen á rætta stað í sandoyarmálinum.

### Sentimetrar á muni

Eftir steðgin dovnaði ferðin heilt nógv. B71 var framvegis varið í útgangsstøðinum, men teir løgu nú ikki heilt so langt afturi á vøllinum, og tí megnaðu teir av og á at skapa kontrastøður, um enn tað var nakað langt millum hesar.

Heimaliðið fekk nú sjáldan sítt spæl at hanga saman. Fyri tað nógva varð spælt við longum bóltum, sum vóru truplir at arbeiða við hjá framherjunum, og rótuta spælið gav mest av øllum ábendingar um, at tvær ferðir 15 minuttir skuldu leggjast afturat.

Og so varð støðan ístaðin hin vælkenda, har marginalarnir vóru á muni millum liðini. Marginalar, sum aftur fullu til liðið, ið vanliga ger um seg í oddinum.

Avgerðin fall, tá fimm minuttir vóru eftir at spæla. B71-málverjin var ikki heilt ósekur, tá hann misti frísparksroynd út til Arnbjørn Hansen. Lobbi frá honum datt á tvørtræið, og so skuldi Hanus Eliasen bara seta fótin á, tá hann var fyrstur á returinum.

Størsta møguleikan at skjóta seg í finaluna, fekk B71 í yvirtíðini, tá Símin Hansen vann fríspark beint uttan brotsteigarmarkið. Men sentimetrarnir vóru ikki í parti við Clayton, tá harða og skrúvandi skotið kíndu skeivu síðuna á stólpanum.

### Stórir kontrastir

Og so var fagnaðurin á sundalagsliðnum sjálvandi stórur. Jublandi áskoðararnir komu inn á vøllin at siga tillukku við næsta finalusessinum í søgu felagsin – og tí næsta á rað.

Sandoyingarnir vóru hinvegin knústir. Hvør sum ein sótu ella løgu teir á vøllinum í iðranini um tað, sum kundi verið. At sentimetrarnir koppaðu skeiva vegin, var hart at skula góðtaka, men soleiðis kann fótbóltur nú eisini vera.

## Spæla ov lítið

Vónbrotið var stórt hjá sandoyingunum. Símin Hansen, sum stóran part av dystinum hevði eina hampuliga einsamalla tilveru, kundi illa gera annað enn at staðfesta kalda veruleikan, tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð.

- Hetta er súrt. Vit eru so nær við, og kortini langt frá. So sjálvandi er tað hart í løtuni, segði Símin, tá vit høvdu orðið á hann eftir dystin.

Um sjálvt spælið segði Símin, at teir í ov lítlan mun fingu sett sín dám á dystin.

- Teir spæla nógv við longum bóltum, og tá vit so byrja at gera tað sama, verður ógvuliga trupult at fáa samanhang í.

## Skuldi trýstast inn

Sigursharrin hjá sundalagsmonnum var fuglfirðingur. Við málinum til 2-1 varð Hanus Eliasen dagsins maður, og so bilti minni, at hann hevði misnýtt tveir stórar møguleikar fyri steðgin.

- Hatta var eitt ótrúliga deiligt mál at fáa. Sjálvur skuldi eg ikki gera so nógv, annað enn at seta fótin á, men hatta var ein veldugur lætti.

*Tit sóu moyrir út. Høvdu tit havt orku at spælt hálvan tíma afturat?*

- Tað hevði man kanska klára. Men kreftirnar vóru av álvara við at ganga undan. Fyrra hálvleik spæla vit í løtum heilt góðan fótbólt, men eftir steðgin kom ikki veruligt glið á, og tá er altíð strævið at spæla. Men tíbetur megnaðu vit so at avgera dystin, áðrenn tað kom so langt.

Og tá mann kemur til eina finalu, so fer mann væl eisini eftir sigrinum har?

- Ja, sjálvandi. Alt annað vildi jú verið býtt, so vit vóna at klára tað tvey ár á rað, segði Hanus Eliasen.